www.klubbin.fo

TIL DANSIN
LEYGARKVØLDIÐ
SPÆLA

PUNKTUM

HAVNAR KLUBBI
Stovna ur 1799

Sosialurin 34180

Leygardagin 15. januar kl. 17 (e)

Í sendingini verður vitjað á bilasøluni Ivan Bilum við Hoyvíksvegin, har ein Mitsubishi ASX verður royndarkoyrdur saman við Magnusi Remberg sølumanni.

Eisini verður ein samrøða endursend við Ronny í Lon, sum hevur stóran áhuga fyri Speedway og fylgir væl við í kappingunum.

*** Sendingin verður eisini endursend sunnudagin kl. 17**



Ronny í Lon



Magnus Remberg

Vinnu- & bílradio á Rás 2



SOZOPREPRESS

# STJÓRI TIL ÍLEGUSAVNIÐ

Áhugavert starv sum stjóri fyri Ílegusavnið er leyst at søkja. Ætlanin er at fáa sett starvið skjótast til ber.

## Um starvið

Stjórin fyri ílegusavnið fær ábyrgdina av leiðsluni, menningini og rakstrinum av Ílegusavninum, sum húsast á Landssjúkrahúsinum og í Eirargarði. Virksemið hjá Ílegusavninum er í tøttum samstarvi við Heilsuverkið um verkætlanir, prøvatøkuhandfaring og biobanka og við Landsskjalasavnið um ættarbandsskránna.

Høvuðsuppgávan er at skipa, byggja upp og fyrisita:
- Ættarbandsskránna
- Vevnaðarskránna (biobankan)
- Diagnosuskránna og at viðgera umsóknir um at granska í skráunum og samstarva við hesar granskingarverkætlanir. Onnur týðandi uppgáva tengd at hesum er at viðvirka og skapa fyritreytir fyri nýggjum granskingarverkætlanum innanhýsis í heilsuverkinum og í samstarvi við útlendskar granskingarstovnar.

## Førleikakrøv/ynskir

Ynski er at fáa umsøkjara, ið hevur útbúgving frá hægri lærustovni innan samfelagsvísindaliga ella innan fyri náttúruvísindaliga økið.

Umframt omanfyrinevnda ynskja vit, at tann, sum settur verður, hevur:
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hesi.
- Evni at seta í verk fyriskipanir og menna verkætlanir saman við samstarvsfeløgum.
- Nútíðar leiðslueginleikar.
- Góð samstarvsevni- og vilja.
- Evni at eggja og menna starvsfólk.
- Vilja til at royna nýggj virkisøki og røkka út til nýggjar samstarvsfelagar.
- Kunnleika til enskt á høgum støði, bæði í skrift og talu.
- Kunnleika til kunningartøkni, dátugrunnar o.l.

## Setanartreytir

Starvið verður sett undir Heilsumálaráðnum við tilvísing til aðalstjóran. Setanarøki umfatar tó alla miðfyrisitingina, t.e. Løgmansskrivstovuna og øll stjórnarráðini. Tann setti má tola broytingar í setanarviðurskiftunum, herundir eisini, at Ílegusavnið møguliga fer at verða lagt saman við øðrum stovni.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á t-posti: poul.geert.hansen@hmr.fo ella tel 30 40 50, ella Sigurð Ó. Vang, á t-post: director@biobank.gov.fo og tel 30 40 12. Nærri kann lesast um Ílegusavnið á **www.biobank.gov.fo**

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til:

**Heilsumálaráðið**
Att.: Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2, 100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er
**26. januar 2011 kl. 14.**

**Heilsumálaráðið**, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn
tel 30 40 50, fax 30 40 25, hmr@hmr.fo, www.hmr.fo